


*Fólkafundur í Reynsmúlalág í 1908. Fyrireikaður av Ungmannafelagnum*




*Her sæst byrjanin til Faðir Vár í sjálvum blaðnum*

døgum norði í bygdini K. Holdan æt maður í bygdini. Hann var fátækur, men hevði verið av ídnastu monnum til sjós, og betri bønarmann fingu bøndurnir ikki enn hann. Kona hansara æt Billa. Tey hava nú verið gift í 16 ár og áttu sjey børn. Elstir vóru Hanus og Jóan Petur. Hjá Holdani búðu hansara gomlu foreldur, ið bæði vóru farin av 70. Tó at tíðirnar vóru ringar hjá Holdani og øðrum, høvdu tey tó ikki rættiliga kent til hungur har í húsinum. Men nú var øðrvísi vorðið.

Holdan hevði í rakstri brotið beinið, og enn lá hann til songs og kundi einki gera. Um hetta bilið var Hanus 15 ár og Jóan Petur 12. Teir vóru sum ungdómar flest, sum kanska høvdu hoyrt meira av góðum heima enn mangir javnaldrar. Tí bæði faðir og móður, so væl sum abbi og omma, vóru ógvuliga kristiliga sinnað og hevði tað verið strevið at lagt gott í børnini. Tað var trongt í húsinum hjá Holdani nú, og har treyt so at siga alt. Tað sást á andlitinum á bæði ungum og eldri, at tey liðu neyð, og ofta grótu tey yngri børnini eftir mati. Tað eru mong, ið eru ov stolt at bidda, og hvussu langt skuldi tað sindri, ið fekst á tann hátt, rokkið til so nógvar munnar sum hjá Holdani.

### Tann stóra freistingin

Hanus og Jóan Petur sóu væl, hvussu sorgarfull tey gomlu vóru, og teir royndu, hvat teir kundu. Men hvaðani skuldu teir fáa nakað stórvegis til hjálpar? Teir gravaðu sløkjurøtur upp og stungu fliður, men hetta var berskin kostur, tá einki annað fekst afturat.

Tá teir gingu framvið hjallinum hjá Janusi bónda, stóð skerpiroykurin ramur út móti teimum og loypti brell á teir eftir kjøti, men annað enn skerpiroykin fingu teir ikki. Aldrin var tað komið teimum til hugs at taka frá øðrum.

Tað stóð verri og verri til hjá Holdani alt sum út leið. Hanus og Jóan Petur gingu sjúkir í sinni, tí teir kundu ikki hjálpa. Ein dag helt Hanus við Jóan Petur: "Janus hevur nógvan mat í hjallinum, hann ið hevði átt sær eitt sindur av honum". "Tað hevur hann", helt Jóan Petur, "men óivað ikki meira enn nokk til seg og síni, tí veturin er langur".

Teir tosaðu ikki meira um hetta hesa ferð, men hjallurin hjá Janusi fór teimum tó ikki úr huga, tí har var matur, og tað var tað, ið treyt hjá Holdani.

Ein dagin, teir lógu úti í bønum og gravaðu sløkjur, fór Jóan Petur at gráta. "Eg orki ikki meira bróður", helt hann, og tárini komu eisini í eyguni á Hanusi. "Hevði tað verið synd at farið í hjallin hjá Janusi í kvøld og fingið sær okkurt av mati?" spurdi Jóan Petur. Hóast Hanus hevði hugsað tað sama, var hann illa við av hesum spurningi og svaraði: "Ja, bróður, tað er tað, tí tað er ikki okkara. Várharra sær alla staðni, og hansara eygu vildu fylgt okkum, um ikki mannaeygu sóu okkum". "Heldur tú, at einglarnir høvdu grátið". "Tað mundu teir óivað," helt Hanus. Jóan Petur græt aftur. "Tú, tey doyggja av svongd har heima, og eg havi ikki hjarta at fara inn aftur".

Har lógu teir báðir beiggjarnir og grótu, hvør meira sorgtungur enn annar.

Tá teir fóru heim aftur bóru teir við sær nakrar sløkjurøtur. Tað skýmdi væl, tá teir komu fram við hjallin hjá Janusi. Teir hugdu at hvørjum øðrum, men Hanus segði bara "Nei", og so gingu teir heim til sín sjálvs. Teir sóu á mammuni, at hon hevði grátið, og at døma eftir teimum reyðu og hovnu eygunum hevði hon ofta grátið hesa seinastu tíðina.

### Faðir Vár bjargaði teimum

Hanus mátti út, tað bleiv ov trongt inni og Jóan Petur aftaná. "Tú Jóan Petur, vit fara at royna tað". Jóan Petur segði einki, hann fór aftaná Hanus. Teir stóðu upp við hjallin. Jóan Petur græt. Hann var so bleythjartaður. "Hví man Várharra vera so illur við okkum". "Eg veit ikki Jóan Petur, men kanska tað eru vit, sum eru so ónd". "Ja, men tey lítlu systkini tá?" Hanus visti einki at svara. "Skulu vit ikki heldur fara heim aftur", helt Jóan Petur. "Várharra gloymir okkum hetta ongantíð, dersum vit bróta inn í hjallin". Hanus og Jóan Petur grótu, sum um hjartað skuldi sprongjast í teimum. "Bið eina bøn, Jóan Petur, bið Harran gloyma okkum hetta. Bið Faðirvár!" Og við gráti í eygunum bað hesin lítli drongur Faðir Vár. Tað var sum at nakað ilt, ein ring marra var flýdd frá teimum, og hond í hond fóru hesir neyðar fátækradreingir aftur til sítt heim.

Men ein hevði hoyrt teirra tos, og tað var Janus bóndi. Hann stóð inni í hjallinum, tá teir stóðu uttanfyri. Janus var eingin illur maður. Hann hjálpti, har hann kundi. Um kvøldið sendi hann mat, skerpikjøt og annað heim til Holdan, og síðan hevði hann um veturin dreingirnar at hjálpa sær við eitt og annað og samsýndi teimum altíð væl fyri tað.

Holvdan bleiv arbeiðsførur aftur. Sum út leið, og summarið vann av vetrinum, blivu frægari tíðir fyri fólk, og um summarið komu tvær stórar grindir.

Tá Hanus og Jóan Petur vuksu til, blivu teir evnaligir og dugandi menn, og eingin hevði annað enn gott at siga um teir. Men ongantíð gloymdu teir ta løtuna, tá teir stóðu undir hjallinum hjá Janusi.

Tá Janus lá á deyðastrá, hevði hann boð eftir Hanusi og Jóan Peturi. Tá fyrst segði Janus frá, hvat hann hevði hoyrt hitt kvøldið fyri árum síðani.

**Kartni**

# Til mannfólkini í Ungmanna-felagnum

*Kvinnurnar í Ungmannafelagnum hava ikki verið fyri ongum. Longu fyri 100 árum síðani fóru tær í herna móti royking, sum hesin stubbi vísir*

Ungmannafelagsins mikukvøld hevur altíð verið okkum eitt kvøld, sum vit leingjast aftur eftir, hvørja ferð vit hava verið har. Men eitt er tað, okkum ikki dámar, og sum vit ikki kunnu koma niðan aftur fyri. Tað er ein óskikkur, sum tey flestu av mannfólkunum hava. Tað er at sita og roykja bæði undir møtinum, sum frammanundan og aftaná tað.

Roykur er nakað, ið ikki øll tola, tí tað er ringt fyri høvd og eygur. Tá nógv heldur eina skrá. Tað sær nú heldur ikki vakurt út, helst tá ið Mikk koyrir eitt heilt rull í munnin.

Tit hava ivaleyst fatað, hvat tað er, vit vilja tykkum. Tað er um tit ikki vilja vera av tí stóru góðheit at lata pípur, tubbakk og tílíkt heima eftir, tá ið tit koma her niðan. Vit ivast ikki í, at tit vilja í hesum stykki gera okkum eitt lítið sindur eftir vild. At tit sjálvir vinna við tað, sigur seg sjálvt.

*Vinarliga og virðingarmest*

**Nakrar kvinnur**
**Limir av felagnum**

# Tá ið Óli róði deyðaróður sín

*Henda søgan var í Baldursbrá 28.3. 1908. Rithøvundur var Mads A Winther og blaðstjóri Petur Alberg*

Tað var í árinum 1779 hetta fyrifall, sum nú skal sigast frá. Hann hevði lagað seg væl við veðrinum, og mong var veiðan førd í land í torra og várróður. Tey hálendsku og ensku fiskiskipini, her uppi lógu og royndu grunnarnar, veiddu væl eins og bátarnir. Bar so til, at veður gjørdist øðismikið og vandafult fyri bátarnar fyri landkoming, so sýndi bæði hálendarar og eingilskmenn seg beinasamar til at flyta menn, far



*Grindin bjargaði bjargaðu mongum húsarhaldi í hesum tíðum*